## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av norði og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, og ælingur, seinnapartin minni vindur av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hann veksur vindin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og regn, sunnudagin ælingur. Hitin millum 9 og 13 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# "Mær dámar væl at mála"

**21 ára gamli Lars J. Jensen er í læru sum málari hjá Una Zachariasen, málarameistara. Hann verður útlærdur í næstum. Frítíðina nýtir hann fyri størsta partin til road-racing.**

*Dagsins føroyingur*
*Orð&mynd: Snorri Brend*

**Hvat er serligt við at vera málari?**
- Mær hevur altíð dámað væl at mála. Og tað geri eg framvegis, hóast eg verði útlærdur um tveir mánaðir. Í løtuni mála vit á Hotel Tórshavn, men hava eisini málað í barnagarðinum á Velbastað.

**Hvat gert tú í frítíðini?**
- Eg brúki næstan alla mína frítíð uppá road-racing við motorsúkklu. Vit fáa ikki vant í Føroyum, men eru við til kappingar í øðrum londum. Í næstu viku fara eg og tríggir aðrir til Danmarksmeistaraheitið, sum verður hildið í Djurslandi.

**Hvat heldur tú um føroyska veðrið?**
- Veðrið kundi verið betri. Men í okkara arbeiði munnu vit kortini skiftast um at mála úti ella inni, alt eftir sum veðrið er.

**Hvørjum heldur tú við í fótbólti?**
- Eg haldi við HB. Eg hopi at teir gerast Føroyameistarar í ár. Eg spældi við HB fyrr, men hyggi ikki so ofta eftir teimum longur. Eg gleðist tó um, tá teir vinna.

**Hvørjum vilt tú heilsa?**
- Vinum og kenningum.



*Lars J. Jensen dámar væl at mála. Í løtuni arbeiða hann og starvsfelagar hansara á Hotel Tórshavn*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 14 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 26 |
| Helsinki | 22 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 28 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 31 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1005 hPa. sunnan fyri Ísland kemur móti Føroyum og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum seinnapartin týsdag.




**Í dag:**
Lágtrýstið skamt eystan fyri Føroyar fer spakuliga í landsynning. Tað gevur nógvan vind á okkara leiðum fram til hósmorgunin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 7/8 kl. $06^{00}$– 8/8. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,2° - Mesti hiti máldur í juli: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 7/7 kl. $06^{00}$– 8/8 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 15,1 mm

Sosialurin

GEVIÐ BLÓÐ

## VESTFALLSKYRRINDI

10. august — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. Aug | 06.20 | 18.47 | 05.20 | 17.47 | 05.35 | 18.02 | 08.20 | 20.47 | 09.20 | 21.47 |
| 9. Aug | 07.14 | 19.39 | 06.14 | 18.39 | 06.29 | 18.54 | 09.14 | 21.39 | 10.14 | 22.39 |
| 10. Aug | 08.05 | 20.30 | 07.05 | 19.30 | 07.20 | 19.45 | 10.05 | 22.30 | 11.05 | 23.30 |
| 11. Aug | 08.55 | 21.19 | 07.55 | 20.19 | 08.10 | 20.34 | 10.55 | 23.19 | 11.55 | - |
| 12. Aug | 09.43 | 22.06 | 08.43 | 21.06 | 08.58 | 21.21 | 11.43 | - | 00.19 | 12.43 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. Aug | 04.35 | 17.02 | 03.35 | 16.02 | 06.35 | 19.02 | 07.35 | 20.02 | 06.05 | 18.32 | 07.20 | 19.47 |
| 9. Aug | 05.29 | 17.54 | 04.29 | 16.54 | 07.29 | 19.54 | 08.29 | 20.54 | 06.59 | 19.24 | 08.14 | 20.39 |
| 10. Aug | 06.20 | 18.45 | 05.20 | 17.45 | 08.20 | 20.45 | 09.20 | 21.45 | 07.50 | 20.15 | 09.05 | 21.30 |
| 11. Aug | 07.10 | 19.34 | 06.10 | 18.34 | 09.10 | 21.34 | 10.10 | 22.34 | 08.40 | 21.04 | 09.55 | 22.19 |
| 12. Aug | 07.58 | 20.21 | 06.58 | 19.21 | 09.58 | 22.21 | 10.58 | 23.21 | 09.28 | 21.51 | 10.43 | 23.06 |

5 707265 100036 >